# Dansur og spæl eru gleðibrøgd

**Úr øllum Norðanlondum eins og úr og Hetlandi stevna fólk fyrst í juli til dansistevnuna Havleik 2002, sum verður hildin í Føroyum**

DANSUR
*Edvard Joensen*

Tað fara fleiri hundrað fólk at luttaka á dansistevnuni Havleikur 2002, sum hildin verður í Føroyum í døgunum frá triðja til sjeynda juli í ár. Fólk koma úr øllum Norðanlondum, eins og hetlendingar eisini verða við. Tað er Sláið Ring, landsfelagið hjá føroysku dansifeløgunum, sum er vertur fyri stevnuni.

Maria Samuelsen, sum er formaður í fyrireikingarnevndini, sigur, at higartil hava umleið 300 útlendingar boðað frá luttøku. Hvussu nógvir føroyingar verða við, veit hann av góðum grundum ikki enn. Tilmeldingarfreistin er úti 1. mai. Dansifeløgini hava fingið tilmeldingarskjøl við skrá yvir stevnuna, og kunnu fólk so boða frá luttøku. Hugsað verður bæði um limir í dansifeløgunum sum dansa føroyskan dans eins og tey, sum dansa útlendskar dansir.

Eysturskúlin í Havn verður líkasum høvuðsstøð á stevnuni, av tí, at tað verður har, teir flestu útlendsku gestirnir gista. Eisini verða allar máltíðir í samband við stevnuna á Eysturskúlanum. Talan er um tríggjar máltíðir dagliga, sum luttakararnir kunnu tekna seg til.



*Norðurlendska dansistevnan Havleikur 2002 verður sett á Vaglinum í Havn triðja juli. Myndin er frá Landsdansistevnuni hjá føroyslu dansifeløgunum, sum var í fjør*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Dansistevnan Havleikur 2002 verður ikki bara í Havn, men verður spjadd víða um landið. Eitt nú er partur av skránni, at luttakararnir hósdagin 4. juli fara út til ymsu dansifeløgini í landinum at vitja.

Eisini verða útferðir gjørdar ymsastaðni, og eitt skeið í føroyskum dansi verður hildið úti í Fugloy. Farið verður úr Havn fríggjamorgun, og komið verður aftur til Havnar seinnapart leygardag.

Ymsir fyrilestrar verða á stevnuni, eins og skeið í føroyskum dansi verður í Havn umframt tað, sum hildið verður í Fugloy.

Fyrilestrarnir vera um føroyskan dans, føroyskar bátar og føroysk klæði. Teir verða allir í Eysturskúlanum fríggjadagin.

Sjálv stevnan verður sett á Vaglinum i Havn mikukvøldið tann triðja juli klokkan 19.00. Roknað verður við, at sjálv setanin fer at vara einar tveir tímar.

Tá hátíðarhaldið er av, verður farið farið niðan í Sjónleikarhúsið og í fimleikarhallirnar í Kommunuskúlanum til sonevndan samansjóðingardans, har fólk kunnu læra hvønn annan at kenna. Skipað verður soleiðis fyri, at hvørt landið sýnir fram ymsar dansir. Skipað verður eisini fyri dansi á somu støðum hóskvøldið og fríggjakvøldið.

Viðrar ikki at seta stevnuna á Vaglinum, verður hon sett í ítróttarhøllini á Hálsi ístaðin.

Fríggjakvøldið verður føroyskt mentanarkvøld í Eysturskúlanum, sum Vár Jacobsen og Páll Danielsen fara at vera vertir fyri.

Leygardagin verða dansiframsýningar á ymsum støðum í Havn. Dansað verður í gongugøtuni, umframt at vitjað verður í handlum og stovnum kring býin.

Leygarkvøldið verður stór fráfaringarveitsla í Ítróttarhøllini á Hálsi. Aftan á borðhaldið verður dansað í trimum støðum. Í ítróttarhøllini, í HB-húsinum og í B36-húsinum. Móti morgni verður morgunmatur.

Fremmandu gestirnir fara flestir avstað aftur sunnudagin. Tó er møguleiki at verða verandi til mánadagin, siga fyrireikararnir.

Føroyingar, sum ætla sær at luttaka á Havleiki 2002, skulu boða frá luttøku áðrenn 1. mai. Tað gerst við at lata tilmeldingarseðil inn til ferðaskrivstovuna MB Tours í Havn og at gjalda tilmeldingargjald í Føroya Sparikassa í seinasta lagi tann 1. mai.

Tilmeldingargjaldið er 80,- krónur og gevur tað tá rætt til felags dansikvøldini. Mentanarkvøldið og fráfaringarveitsluna, skal gjaldast eyka fyri, eins og gjørt verður fyri útferðirnar.

Meira fæst at vita um dansistevnuna Havleik 2002 við at vitja heimasíðuna hjá Sláið Ring, sum er at síggja á www.slaidring.fo.

# Vónar betri ullarprís

**Hugskotið við ullarmóttøku er gott, sigur Dímunabóndin, sum kortini ivast í, um tað fer at loysa seg at gera nakað stórvegis burtur úr innsavning, um prísurin ikki verður betri enn tað, higartil hevur veirð frammi**

LANDBÚNAÐUR
*Edvard Joensen*

– Tað er sera hugaligt, at hugsað verður um at fáa ullina til høldar, sigur Óla Jákup úr Dímun, bóndi á Stóru Dímun. Men hann ivast koritini í, hvussu nógv fer at verða lagt fyri til tess at fáa ullina innsavnaða, um prísurin ikki verður heldur hægri enn tað, higartil hevur verið nevnt.



*Ullarprísurin er í lægra lagi til at tað fer at loysa seg at savna ullina á Dímun og senda hana til eina móttøku, heldur Dímunarbóndin, sum tó er fegin um, at nakað verður gjørt fyri at fáa nyttu burtur úr ullini*

Nevnt hevur veirð í samband við tíðindini um ullarmóttøkuna, Vinumálastýrið ætlar at seta á stovn, at prísurin í dag liggur um fýra krónur fyri kilog, og so hevur líkasum ligið í luftini, at tað skal vera minstiprísur í framtíðini.

– Í okkara føri er tað knapt nokk fyri frakt, sigur Óla Jákup úr Dímun, sum kortini ásannar, at hann er í eini serstøðu, tí alt skal flúgvast av oynni.

Hjá onkrum, sum til dømis er granni hjá eini móttøku, verður tað sjálvandi meira lønandi. Men hann heldur tó, at fýra krónur ljóðar í lægra lagi.

Skuldi ullin verið goldin í lutfalli til tað, hon kostaði, tá tikið varð í móti ull seinat, skuldi prísurin verið rættiliga nógv hægri, vísir Dímunarbóndin á. Minst einar tíggju- tólv ferðir tað, sum nú er nevnt, heldur hann.

### Tað várar

Várið er farið at merkjast á Dímun, sigur Óla Jákup. Fyrstu lombini eru komin, og hann væntar, at tað fer at lemba regluliga frá nú av.

Lunda hevur hann ikki sæð í bakkanum enn, sigur hann, hóast farið er nakrar dagar um summarmála, tá gamalt er at siga, at lundin tekur land. Men tey vænta lundan hvørt kvøld, tað skal vera.

– Tað plagar at vea so, greiðir Dímunarbóndin frá, at fyrstu lundarnir koma í bakkan um kvøldið. Lomviga hevur ikki verið nógv at sæð av higartil í ár heldur.

Annars er fólk úti í Dímun um dagarnar fyri at útbyggja tyrlupallin, so hann lýkur tey krøv, sett verða, sigur Óla Jákup úr Dímun. Hetta er arbeiði, sum byrjað varð upp á seinasta heyst, ið nú verður gjørt liðugt.



# Arbeiðsloysistryggingin tjenti 82 milliónir seinasta ár

TÍÐINDASKRIV

Tað er hugaligt at arbeiða í arbeiðsloysistryggingini. Næstan einki arbeiðsloysi er í landinum og peningastreymurin er næstan bara einvegis inn í kassan. Rakstrarúrslitið fyri 2001 var 82,2 mió. kr. Hetta er ein øking uppá 16,4% í mun til í 2000, tá úrslitið var 70,6 mió. kr. Høvuðsorsøkin til vøksturin er at finna í tí omanfyri nevnda fallinum í arbeiðsloysinum.

Ársroknskapurin fyri 2001 er tíggindi ársroknskapur hjá Arbeiðsloysisskipanini. Ársroknskapirnir hesi árini hava endurspeglað tær sera stóru broytingarnar, sum eru hendar í samfelagnum, har farið er frá svárari samfelagskreppu við høgum arbeiðsloysi til stóran samfelagsligan framburð við einum arbeiðsloysi millum 2 og 3% av arbeiðsstyrkini.

2001 gjørdist eitt ár afturat við ferð á búskapinum. Samstundis sum arbeiðsstyrkin vaks við millum 3 og 4%, minkaði arbeiðsloysið enn meira, og var tað alt árið ímillum 1/2 og 1% stig lægri enn í 2000.

**Inngjøld**
Við gildi frá 1. apríl 2001 avgjørdi stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina at lækka ALS-gjaldið úr 1,5% niður í 1,25% (samlaða ALS-gjaldið 2,5%). Hóast lønarútgjaldingarnar hækkaðu í 2001 við út við 14%, hevði lækkingin í inngjaldinum í 2001, umframt lækkingin uppá 1/2 % stig í miðjum 2000, við sær, at inngjøldini til ALS minkaðu úr 150,1 mió. kr. í 2000 niður í 137,1 mió. kr. í 2001, t.v.s. við umleið 8,7%.

**Útgjøld**
Samlaða útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli fall við umleið 24,8% úr 80,1 mió. krónur í 2000 til 60,2 mió. krónur. Størsta prosentvísa fallið er í fiskavirkisskipanini, har útgjaldið fall við 50,5% í mun til árið fyri.

Miðaltalið av móttakarum av arbeiðsloysisstuðli í 2001 var 921. Hesi býttu seg í 573, ið fingu stuðul eftir vanligu skipanini, og 348, ið fingu stuðul eftir fiskavirkisskipanini. Í 2000 var samlaða miðaltalið 1.417, t.v.s. ein minking í 2001 uppá 35% í mun til í 2000.

**Ársúrslit og eginogn**
Samlaðu fyrisitingarútreiðslurnar (lønir og kostnaður) fullu í 2001 við 1,4 mió. kr., ella 12% í mun til 2000.

Úrslitið av fíggjarpostum í 2001 var 16,7 mió. kr. Ár 2001 varð annað árið, tá ið úrslitið av fíggjarpostum gjørdist størri enn tær samlaðu fyrisitingarútreiðslurnar. Hetta hevur við sær, at tað tekniska úrslitið, t.v.s. munurin millum samlaðu inngjøldini av ALS-gjaldi og samlaðu útgjøldini til arbeiðsleys, beinleiðis fer til konsolidering av skipanini. Miðal avkastið av virðisbrøvunum í 2001 var 5,67%.

Eginognin við ársenda 2001 er 374,8 mió. kr. í mun til 262,6 mió. kr. við ársenda 2000. Hesin vøksturin í eginognini uppá 112,2 mió. kr. er orsakað av at rakstrarúrslitið uppá tær 82,2 mió. kr. og eina afturføring av teimum 30 mió. kr., sum upprunaliga vórðu avsettar í 1996 í sambandi við ógreiðu um tulking av ásetingunum í fyrrverandi ALS-lógini. Tulkingin, sum ALS hevði, varð staðfest í Føroya Rætti í ávísum máli, har ALS hevði stevnt einum viðskiftafólki fyri rættin, tí leiðslan á ALS ikki var samd við Kærunevndini í tulkingini um, at viðkomandi skuldi hava størri arbeiðsloysisstuðul útgoldnan.

1997 var fysta árið síðan 1992, at eginognin aftur var positiv. Síðan 1997 hevur stýrið støðugt sett ALS-gjaldið niður (úr 2,75% niður í 1,25%). Sum áður umrøtt, verður mett sera umráðandi, at Arbeiðsloysisskipanin stimbrar um eginognina í góðum tíðum, soleiðis at peningur er at standa ímóti við, um arbeiðsloysið aftur veksur. Sum dømi um, hvussu álvarsom støðan kann gerast, kann verða víst til 1993, tá ið útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli var 285 mió. kr., og úrslitið av vanligum rakstri var uppá -122 mió. kr.

Nú eginognin er út við 400 mió. kr., fer ALS at viðgera, hvørjar broytingar eiga at verða gjørdar í skipanini, nú eginognin nærkast tí støðd, sum áður er sett sum mál.

**Barsilsskipanin**
1. juni 2001 kom í gildi nýggj barsilsskipan fyri tann samlaða føroyska arbeiðsmarknaðin. Síðan skipanin byrjaði í juni 2001, hevur Arbeiðsloysisskipanin, eftir áheitan frá Vinnumálastýrinum, staðið fyri útgjaldinum av barsilspeningi. Toll- & Skattstova Føroya stendur fyri inngjaldspartinum.

**Útlitini fyri 2002**
Hóast tað kanska verður ein framhaldandi vøkstur í tí føroyska búskapinum í 2002, verður hesin tó væntandi ikki eins stórur, og vit hava sæð tey seinastu árini. Henda meting verður m.a. grundað á fallið í fiskaprísunum og trupulleikarnar innan rækju- og alivinnuna. Byggivinnan og aðrar vinnur boða tó frá støðugt nógvum arbeiði í 2002. Á ALS síggja vit somuleiðis eitt framhaldandi fall í arbeiðsloysinum, nú í byrjanini av árinum, samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Hetta saman við lønarhækkingunum á arbeiðsmarknaðinum, førir óivað við sær, at inntøkurnar hjá ALS verða nakað hægri í 2002 sammett við 2001.

Støðuga fallið í arbeiðsloysinum fer væntandi at hava við sær, at útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli verður nakað lægri í 2002 enn í fjør. Tó kunnu trupulleikar í fiskivinnuni á sjónum og á landi koma at bera við sær økt útgjald innan bæði fiskavirksisskipanina og vanligan arbeiðsloysisstuðul.

Við tí vaksandi gjaldsførinum er úrslitið av fíggjarpostum alsamt vaksið seinastu árini. Útlitini fyri avkasti av virðisbrøvum í 2002 eru rímulig, og hetta, samanhildið við alsamt øktu lánsbrævaognina, hevur við sær, at úrslitið av fíggjarpostum í 2002 væntandi verður nakað hægri enn í 2001.

Sí annars hjálagda ársroknskap fyri 2001 við samanberingartølum fyri 2000. Somuleiðis eru hjáløgd hagtøl, ið lýsa gongdina í arbeiðsloysinum seinastu árini.

Vinarliga
**Arbeiðsloysisskipanin**


